# Ársins neyðrakett

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



Eg skrivaði í farnu viku eina grein um viðmerkingarnar, sum Høgni Hoydal hevði til nýggjársrøðu løgmans. Eg samanbar viðmerkingar hansara við støðuna, tá alt nýggjárskrútið er uppbrúkt og bara tey allar seinastu físini eru eftir. Men nú vísir tað seg, at krútposin var ikki heilt tómur. Fríggjadagin hevði sami maður eina grein í bløðunum, sum var ein røð av neyðrakettum frá einum politiskum flokki, sum hevur rent seg fullkomiliga fasta. Í flestu førum var talan um endurnýtslu av gomlum krúti, men okkurt skotið av nýggjari slag var eisini at hóma innímillum.

Eg má undrast yvir, at so nógvar villleiðandi upplýsingar kunnu rúmast í eini so stuttari grein, og fari tí at gera nakrar rættingar til einstakar av teimum.

**Neyðrakett nr. 1**
Høgni brúkar orðini "síðani landið fór á heysin við fullum blokkstuðli í nítiárunum..."

Hetta er eitt ógvuliga gamalt skot, sum buldrar meira enn tað upplýsur. Tað er nevniliga stórur munur á at fara á heysin við fullum blokkstuðli og at fara á heysin av fullum blokkstuðli. Vit skulu ikki gloyma, at vit reistu okkum eisini aftur úr kreppuni við fullum blokkstuðli, so tað var ikki har, ið trupulleikin lá.

**Neyðrakett nr. 2**
Høgni skrivar um støðuna síðani 1998, "tá blokkstuðulin varð settur til viks..."

Hetta er beinleiðis ósatt. Landskassin fekk 920 mió. krónur í blokkstuðli í 1998, meðan samlaða avlopið hetta árið (tá blokkstuðulin er íroknaður) var bara 471,5 mió. krónur. Hetta merkir, at umleið helvtin av blokkinum varð ikki settur til viks, men fór til almennar útreiðslur í 1998.

**Neyðrakett nr. 3**
Roynt verður at samanbera blokkstuðulin við bruttotjóðarúrtøkuna, og sagt verður at blokkstuðulin er bara 6 prosent av føroysku framleiðsluni.

Bruttotjóðarúrtøkan sigur, hvussu stórt virðið er á tí, sum alt føroyska samfelagið framleiðir, men hon sigur einki beinleiðis um støðuna hjá landskassanum. Og tað er júst landskassin, sum hevur stórar trupulleikar at dragast við, og tað er eisini landskassin, sum fær allan blokkstuðulin.

So tá Høgni sigur, at blokkstuðulin er bara 6 prosent av føroysku framleiðsluni, so má hann eisini minnast til, at skattainntøkurnar hjá landskassanum, eru bara millum 10 og 11 prosent av føroysku framleiðsluni (men tað merkir ikki, at skatturin hevur lítlan týdning fyri landskassan).

**Neyðrakett nr. 4**
Høgni skrivar, at "skattalættar vórðu givnir fyri 400 mió. undir fyrra ABC-landsstýrinum" (rætta talið er 240 mió. - men lat tað nú fara).

Av eini ella aðrari orsøk hevur hann fingið sær til vana, at vísa til skattalættarnar hjá ABC-landsstýrinum, men hann gloymir at nevna, at fullveldislandsstýrið gav eisini skattalættar. Undan valinum í 2004 sendi Høgni eitt teldubræv út í allar ættir, har yvirskriftin var "Seks ár við Tjóðveldisflokkinum – seks ár við frambrotum". Eitt av "frambrotunum" ljóðaði soleiðis: "Skattalættar eru framdir fyri knappar 400 mió. kr."

Hvussu ber tað til at skattalættar í summum førum verða kallaðir skaðiligir og í øðrum førum eitt frambrot?

**Neyðrakett nr. 5**
Høgni skrivar: "Undir fullveldislandsstýrinum varð skuldin niðurgoldin og milliardir spardar upp."

Nú er tað soleiðis, at eitt landskassaavlop kann bara brúkast upp á tveir mátar. Annaðhvørt verða pengarnir spardir upp, ella verða teir brúktir til at niðurgjalda skuld við. Verða pengarnir brúktir til okkurt annað, so eru teir ikki longur avlop.

Hetta merkir, at um vit telja saman tað sum verður spart upp og tað sum verður goldið fyri skuld, so fáa vit eitt tal, sum svarar til avlopið.

Samlaða avlopið frá 1998 til og við 2003 var 2,6 milliardir krónur. So nógv var goldið fyri skuld og spart upp tilsamans. Men í sama tíðarskeiði fekk fullveldislandsstýrið næstan dupult so nógvar pengar (5,1 milliard krónur) í blokkstuðli umframt aðrar ríkisveitingar, sum liggja uttan fyri blokkin. Tað vil siga, at hvør einasta króna, sum fullveldislandsstýrið spardi upp og hvør einasta króna sum fullveldislandsstýrið brúkti til at gjalda skuld við, kom í landskassan sum blokkstuðul. Og harumframt rindaði blokkstuðulin 2,5 milliardir krónur fyri rakstrarútreiðslur hjá fullveldislandsstýrinum hesi árini, umframt at aðrar ríkisveitingar rindaðu annan almennan rakstur í samfelagnum.

Men Høgni sigur ikki alt hetta. Hann sigur bara: "Undir fullveldislandsstýrinum varð skuldin niðurgoldin og milliardir spardar upp," og hetta sigur hann í eini grein, sum hevur til endamáls at vísa, hvussu óneyðugur blokkstuðulin er.

Seinni í greinini sigur hann at ABC-flokkarnir komu til eitt búgvið borð í 2004, har skuldin var niðurgoldin og 2,3 milliardir spardar upp. Men her er hann sjálvandi so smartur, at hann telur eisini tað við, sum var uppspart áðrenn fullveldislandsstýrið kom til.

**Neyðrakett nr. 6**
Sætta neyðrakettin er ein av hansara nýggjaru pástandum, har hann roynir at siga, at kreppur koma ikki, tí at vit eiga ov fáar pengar, men heldur tí at vit eiga ov nógvar pengar. Eg haldi ikki, at tað er neyðugt at gera so nógvar viðmerkingar til henda pástandin, tí hvat annað skal ein maður siga, sum hevur høvuðsábyrgdina av, at fleiri milliardir av skattgjaldarans pengum eru tveittar burtur? Tá er gott at kunna vísa á, at tað kann vera vandamikið at eiga pengar.

**Neyðrakett nr. 7**
Við síni sjeyndu neyðrakett sigur hann, at landskassin hevði einki ár undirskot, meðan fullveldislandsstýrið sat.

Her kundi verið áhugavert at hugt eftir, hvussu býtið var ímillum árini áðrenn blokkstuðulin minkaði og árini aftaná.

Sum áður nevnt, so var samlaða avlopið frá 1998 til 2003 umleið 2,6 milliardir krónur. Men býtt ímillum tíðarskeiðið áðrenn og aftaná blokkniðurskurðin, so var avlopið 2,4 milliardir frá 1998 til 2001 og bara 0,2 milliardir frá 2002 til 2003. Í 2003 var avlopið komið heilt niður á 22,5 mió. krónur (0,02 milliardir krónur). Tá løgdu teiri eisini frá sær mitt í valskeiðinum!

Um vit ikki telja blokkstuðulin við, so var talan um eitt samlað undirskot á 2,5 milliardir krónur, meðan fullveldislandsstýrið sat og tosaði um "sjálvberandi búskap".

Annars skulu vit ikki gloyma, at Tjóðveldi var eisini við í CHE-samgonguni so seint sum í 2008. Tann samgongan skuldi hava eitt trýsiffrað milliónа avlop á fíggjarlógini, men tá árið var liðugt, vísti roknskapurin eitt undirskot á 330 mió. krónir (aftan á at landskassin hevði fingið meira enn 600 mió. krónur í blokkstuðli).

**Neyðrakett nr. 8**
Spurt verður, hvat heimastýrið hevur kostað Føroyum, og spyrjarin svarar sjálvur, at sambært Caragata-álitinum, kostaðu bara 80'ini 13 milliardir út gjøgnum vindeygað.

Mín spurningur er: Á hvørjari síðu í Caragata-álitinum stendur, at tað var "heimastýrið", sum kostaði 13 milliardir?

**Áhugaverd upplýsing**
Ein upplýsing, sum Høgni kemur við í greinini, má sigast at vera sera áhugaverd. Hann sigur at blokkstuðulin hevði í dag verið 1,4 milliard, var hann ikki skorin og fastfrystur.

Hetta er sera áhugavert, tí 1,4 milliard er 800 mió. meira enn verandi blokkstuðul, og undirskotið á fíggjarlógini er eisini 800 mió. krónur – so kanska hevur Høgni Hoydal, hóast alt, funnið orsøkina til undirskotið? - Tillukku við tí!

# Kann tað verða rætt, at Fuglafjarðar kommuna arbeiðir í heimildarloysi?

JÓHAN HERI JOENSEN
Fuglafjørður



Sum fyrrverandi kommunustýrislimur í 8 ár so kenni eg av góðum grundum eitt sindur meira til kommunala arbeiðið enn vanligi borgarin. Táið vitleysar og beinleiðis ólógligar avgerðir verða tiknar, meti eg tað sum mína skyldu at lýsa málini so væl sum eg eri førur fyri. Fyri at kunna gera tað, verði eg noyddur at taka alt við frá byrjanini av.

Fyrstu ferð eg varð valdur í Fuglafjarðar býráð, var í 1996. Hetta varð í ringastu kreppuárum, skuldin hjá kommununi varð knappar 70 milliónir, so vit vóru stutt sagt fíggjarliga niðurbundin. Sjálvt í armóðini vóru vit fús til at bjóða framtíðini av. Nógv óhjálpin vóru tá ansaði heima, tí einki alment ansingartilboð varð til flestu teirra. Fleiri eru vit, sum minnast hesa óvirðiligu støðu, hvørki kommunur ella land vildu taka ábyrgdina á seg. Eldraøkið og skúlamál vóru eisini tey øki, eg hevði sett mær sum mál at fáa gjørt nakað við. Sum formaður í Mentamálanevndini legði eg á fyrsta fundi fram ynski um at loysa ansingartrupulleikan. Úrslitið bleiv sum kunnugt Vesturstova. Henda loysn - slóðaði fyri - og opnaði eisini ansingarsjónarringin kommunalpolitiskt um alt landið, hon gjørdist fyrimyndin fyri teimum heimum sum síðani tá vóru bygd. Vesturstova, varð sum sagt, bygd meðan fíggjarstøðan varð sera vánalig, tí varð spart har sum sparast kundi. Hon varð ongantíð ætlað til annað enn umlæting, at húsið í dag verður brúkt sum eitt 3 klassa ellisheim, har 2 óhjálpin deila um sama kamar er sera óvirðiligt, og eg skammist í dag av misbrúkinum. Hetta minnir ikki sørt um nútíðargjørdar konsentratiónslegur. Almennur stuðul til byggingina varð eingin, vit bóru allar útreiðslur á egnum herðum, men tíbetur vildi landið umsíðir spæla við og veitti nakað av stuðli, sum bert er vaksin sum árini eru gingin. Sagt verður um Eysturoynna, at ellisheimstørvurin er nøktaður. At Fuglafjarðar kommuna góðtekur hesa niðurstøðu og loyvir misbrúkinum av heiminum, er mær óskiljandi.

Í seinnu býráðssetuni hækkaðu vit kommunuskattin við einum prosenti, lovað varð borgarunum, at allur peningurin, frá hesi hækkan, skuldi setast á konto til at byggja ellisheim fyri (flestu av teimum sum tóku hesa avgerð sita enn í dag í býráðnum). Í 2005 vóru umleið 8 milliónir á hesi konto. Tíverri steðgaði býraðið sum sat í tíðarskeiðnum frá 2005-2008 hesi avseting – men skattaprosentið bleiv ikki lækkað aftur. Her er mest beinrakið at kalla býráðslimirnar sannar orðloysingar. Peningurin bleiv ístaðin bókstavuliga vippaður í havið. Um hildið hevði verið áfram, við hesi skilagóðu avseting, so høvdu vit í dag umleið 25 milliónir á bók at byggja fyri. Vit kundu í dag bygt - kontant - eitt heim uttan mun til hvat lokalpolitikararnir í Løgtinginum dikterað. Ansingartrupulleikin hevði verið lyftur uppá eitt meira virðiligt støði, og vit høvdu við hesum skapt í minsta lagi 20 nýggj arbeiðspláss, umframt byggiarbeiði í hesum soltnu tíðum. Eg eri onga løtu í iva um, at heimið nokk skuldi komið undir veingirnar hjá almennu skipanini. Tað hava vit dømi um frá Vesturstovu. Og landskassans fíggjarliga ábyrgd hevði eisini við tíðini runnið aftur í kommunukassan

Eg fór úr býráðnum í 2004 og væntaði í míni sælu trúgv, at tað sum vit høvdu stungið út í kortið, fór at verða framt í verki. **Men so varð ikki.** Tíverri havi eg ikki mynduleika til at gera nakað við tær avgerðir sum tiknar verða, og siti sum vanligur borgari á síðulinjuni og hyggið at meðan peningurin verður nýttur til skilaleysar íløgur, men tá eg fyri stuttum hevði varðhugan av at tær 8 milliónirnar sum avsettar vóru til ellisheimsbygging, í heimildarloysi, eisini vóru brúktar, tá kundi eg ikki tiga longur. Málið hevur ikki verið fyri á býráðsfundi, men kontoin varð tóm 08. decembur 2009. Eg ivist onga løtu í, at býráðið hevur fingið kaldar føtur, síðani eg bað um innlit í hetta mál, og at kontoin, á ein ella annan hátt, er fylt uppaftur, fyri síðani at verða mál á komandi fundi, har møguliga samtykt verður "lógliga" at neyðtaka hesa konto – vit fáa at síggja, um politikararnir tora og kunnu bera tað skommina - um so verður, so skal eg eisini lova borgaranum, at tað verður ikki tagt burtur.

PENINGURIN ER SETTUR AV TIL ELLISHEIMSBYGGING, OG EINKI ANNAÐ.

At enda vil eg í grovum trekkum vísa fíggjarstøðuna hjá Fuglafjarðar kommunu frá 1996 til í dag.

Í 1996 varð kommunala skuldin knappar 70 milliónir.

Í 2004 varð kommunala

*Framhald á næstu síðu*